tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Tað almenna og blaðútbering

## *Oddagrein*

RÆTTILIGA nógv verður í hesum gjørt burtur úr støðuni hjá postverkinum og útbering av bløðunum. Tá nýggjur stjóri varð settur á Postverk Føroya herfyri var ein av uppgávum hansara at fáa størri javnvág í inntøkur og útreiðslur hjá stovninum. Tað var so eisini stungið út í kortið, at stovnurin skuldi umgerast til alment partafelag. Ætlanin hjá stjóranum at siga nógvum fólki upp var møtt við stórari mótstøðu frá bæði Postfelag og landsstýri, og endaði hetta við, at hóttan um uppsagnir varð tikin aftur. Hinvegin vórðu aðrar broytingar gjørdar, eitt nú var útberingin av bløðunum leygardag steðgað, og bløðini fingu haraftrat greitt at vita, at prísurin fyri útberingina fór at hækka munandi.

SÍÐANI er tað hent, at bløðini hava roynt at byggja upp sína egnu útbering av leygardagsblaðnum men fyri at fáa hesa útbering niður á eina rímuliga príslegu verður umhugsað at stovna felag, sum burturav skal taka sær av útberingini allar dagar í viku og kvøldið fyri útgávudag. Slík skipan fer sjálvandi at hava fylgjur fyri Postverkið og postmenninar, sum tá missa ein stóran part av sínum arbeiðsuppgávum. Eisini liggur í luftini vandin fyri, at postverkið missir útbering av reklamubløðum ol., um so er at stóru ávísirnar Dimmalætting og Sosialurin kenna seg noyddar til at stovna sítt egna blaðútberingarfelag.

SÍÐANI er tað hent, at Postfelagið hevur havt fund um málið men metir seg ikki ført fyri at geva ein nóg lágan prís til tess at kunna bera bløðini út allar dagar og haraftrat um kvøldið. Oman í hetta kemur so avgerðin hjá landsstýrinum at sleppa ætlanini at gera Postverkið til alment partafelag.

HVUSSU og ikki, so líða bløðini undir verandi støðu, og hetta er hvørki haldbart fyri bløðini ella fyri samfelagið sum so. Fyrr var tað so, at landið við játtan síni til postverkið óbeinleiðis rindaði ein part av útberingarkostnaðinum, men tá krøv komu úr Tinganesi til leiðsluna á Postverkinum, at stovnurin skuldi hvíla meira ella minni í sær sjálvum, gekk hetta alt fyri eitt út yvir bløðini : leygardagsútberingin hvarv og útberingarprísurin hækkaði munandi. Hóast bløðini greiddu bæði leiðsluni á Postverkinum og landsstýrismanninum frá tí negativu kolveltandi broyting hetta hevði við sær fyri bløðini, varð ætlanin gjøgnumførd.

HVØRKI av teimum stóru bløðunum, Dimmalætting ella Sosialurin fáa í dag nakran stuðul frá tí almenna, og tað vilja tey heldur ikki hava. Men tey halda tað vera rætt og rímuligt, at landið - eins og gjørt verður í øllum okkara grannalondum - óbeinleiðis stuðlar útberingini. Uppgávan hjá skrivaðu pressuni er at siga frá tí, sum fyriferst í samfelagnum og at hýsa samfelagstjakinum, og hetta eru uppgávur sum bæði Dimmalætting og Sosialurin brúka nógva orku til. Bæði bløðini kenna tað sum sína ábyrgd at kunna um alt tað nógva virksemi, sum er í landinum av øllum hugsandi slag og at geva øllum meiningum og hugsanum innivist í bløðunum. Sum so eru bløðini týðandi berarar av tí so týðandi samfelagskjakinum og eru harvið eisini við til at halda lív í demokratiinum.

TAÐ skal vera vón okkara, at ikki minst løgmaður sum miðlanna ráðharri sær til, at umstøðurnar fyri at bera út bløðini kring alt landið, koma aftur í eina rímuliga og trygga legu.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Løgmaður sleingir um seg við pástandum



Vit síggja dagliga, hvussu løgmaður sleingir um seg við pástandum, sum einki hald er í. Nøkur dømi hesa seinastu tíðina, sum fjølmiðlarnir ikki fingu eyga á, eru hesi:

Í forsíðugrein í Dimmalætting tann 12. februar í ár, kemur løgmaður við eini meting um, hvat hevði hent, um uppritið til uttanlandsnevndina viðvíkjandi samráðingunum við donsku stjórnina varð almannakunngjørt.

Løgmaður verður endurgivin fyri at siga (sitat): »So høvdu vit fingið eitt misálit móti okkum dagin eftir, sambært grein 33 í stýrisskipanarlógini« (sitat endað).

**Stendur ikki har**

Eg setti tí løgmanni henda spurning á løgtingi: »Hvar í grein 33 ella í stýrisskipanini yvirhøvur stendur eitt einasta orð, sum forðar løgmanni í at almannakunngera fyri Føroya fólki samráðingaruppleggið, sum sent er uttanlandsnevndini?«

Svarið frá løgmanni var, at hann hevði mistikið seg. Tað var ikki grein 33, løgmaður meinti við, men grein 54 í stýrisskipanarlógini.

Bæði svarini eru skeiv, tí tað stendur heldur ikki í grein 54, ella nakra staðni í stýrisskipanarlógini yvirhøvur, at løgmaður ikki má almannakunngera samráðingaruppleggið.

**Fjala fyri uttanlandsnevndini**

Í grein í Sosialinum tann 12 februar í ár, undir yvirskriftini »Uppritið kortini almannakunngjørt«, verður løgmaður endurgivin fyri at siga (sitat): »at um slíkar upplýsingar ikki verða handfarnar í trúnaði, kann hetta fáa stóra ávirkan á, hvørjir upplýsingar verða latnir nevndini í framtíðini, tá ið onnur mál vera til viðgerðar.« Tað sama hevur løgmaður ført fram fyri uttanlandsnevndini.

Eg spurdi tí eisini løgmann, um hann kundi vátta tað, hann hevði sagt um henda spurning, ella um løgmaður fór at taka aftur hóttanina, um ikki at lata uttanlandsnevndini allar upplýsingar í framtíðini?

Grein 54 í stýrisskipanarlógini sigur um henda spurning: »Løgtingið velur millum løgtingsmenn eina uttanlandsnevnd við sjey limum, sum landsstýrið ráðførir seg við, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning.

stk. 2. Somuleiðis skal landsstýrið ráðføra seg við hesa nevnd í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.«

**Nógv sløg av málum**

Tá hesin spurningur varð svaraður, mól løgmaður sum hundur um heitan greyt. Fyri hann var málið sera prinsippielt, og tað var eg, sum í míni løgmanstíð hevði innført hesa góðu siðvenju, at alt skuldi viðgerast í trúnaði. Her sipaði løgmaður til samráðingarnar við bretar um undirgrundarmarkið.

Løgmaður mistekur seg aftur her, tí tað ber jú ikki til at skera alt yvir ein kamb.

Samráðingarnar við Bretland vóru av heilt serligum slag. Partarnir undirskrivaðu áðrenn samráðingarnar byrjaðu, at málið skuldi haldast í trúnaði. Eisini aftaná at málið var endað, skuldi tað vera í trúnaði.

**Tingskipanin avgerandi**

Tað er løgtingið, og ikki nakar løgmaður, sum hevur lagt støðið undir politikkin á hesum øki. Løgtingsmenn hava samtykt eina tingskipan, sum ber í sær opinleika, har til dømis gerðabøkurnar hjá tingnevndunum verða lagdar út á internetið.

Uttanlandsnevndin viðger nógv sløg av málum, sum als ongin grund er til at halda í trúnaði. Løgtingslógir, ríkislógartilmæli, fiskivinnusáttmálar, konventiónir, norðurlendsk mál o.s.fr. Onki av hesum er vanligt at viðgera sum trúnaðarmál.

Tá so løgmaður stemplaði uppleggið til nevndarlimirnar í uttanlandsnevndini at vera í trúnaði, og serloyvi mátti fáast, bara fyri at floksfelagir kundu síggja uppleggið, er hetta at fara út um alt mark, og at sammeta við, at løgmaður leggur seg út í politiska frælsið hjá flokkunum.

**Bind fyri eyguni**

Tá so løgmaður eisini hóttir við, ikki at lata allar upplýsingar til uttanlandsnevndina í framtíðini, stríðir hetta beinleiðis ímóti stýrisskipanarlógini. Tí hvussu kann ein nevnd ráðgeva løgmanni, um nevndin ikki fær upplýsingar? Tað má í hvussu so er koma undir heitið ráðgeving við bindi fyri eyguni".

Formanskapurin hevur nú kritað vøllin av fyri løgmanni. Formanskapurin hevur sagt, at tað er løgmaður, sum hevur ein trupulleika. Formanskapurin hevur eisini sagt løgmanni frá, at hann ikki er samdur um, at alt skal viðgerast sum trúnaðarmál.

**Caragata álitið**

Seinasta hendingin í løgtinginum, tá andstøðan undir viðgerðini av Caragata álitinum føldi seg noydda til at siga frá, hvar markið gekk, og hvat andstøðan finnur seg í, er ein avleiðing av, at vit í Føroyum hava ein løgmann, sum letur sínar landsstýrismenn gera júst sum teimum listir. Tað hava vit nógv talandi dømi um.

**Edmund Joensen**

# Postboð í hálva øld

## *Í dag eru 50 ár liðin, síðan Sámal Clementsen byrjaði sum postboð*



Hann hevur tænt fleiri kongum - og drotning við - Sámal Clementsen, postboð í Havn. Hann hevur í dag 50 ára starvsdag sum postboð.

Hendan langa starvstíð hansara er so kristiliga býtt millum danska og føroyska postverkið. 25 ár hjá hvørjum.

Sámal byrjaði sum danskt postboð í Føroyum í reyðum uniformi. Hann skifti lit í hálvleikinum og fór tá í tann bláa búnan hjá Postverki Føroya, sum hann enn er í.

**ej**



# Vaksa um skúlan í Fuglafirði

## *Fuglfirðingar fara í næstum undir fyrsta stigið í einari umfatandi ætlan um at nútímansgera skúlan*

John Johannessen

Fuglafjarðar Kommuna hevur gjørt eina ætlan um at byggja út skúlan í bygdini í seks stigum fyri ein samlaðan kostnað á 50, 5 milliónir krónur. Byggiætlanin er í seks stigum, og er tann fyrsta mett at taka umleið 3 ár og at kosta um 8,5 milliónir.

Býráðsforkvinnan í Fuglafirði, Hallbjørg Hansen, sigur, at talan er um eina stóra heildarætlan, ið verður framd í smáum eftir fíggjarligu orkuni, og tí er ilt at siga, nær skúlin verður liðugt umbygdur.

**Fleiri serstovur**

Fyrsta byggistigið fevnir um at byggja ein bygning niðan fyri verandi skúla. Bygningurin skal vera í tveimum hæddum. Í niðaru hæddini skulu vera høli til motorlæru og annað í hesum sambandi, somuleiðis sum ein stova skal vera til evning.

Í ovaru hæddini skulu vera serstovur, ið lúka tær treytir, nýggja fólkaskúlalógin setir.

Tá farið verður undir annað byggistig um eini trý ár, er ætlanin at byggja ein skála og fleiri serstovur oman fyri skúlan.

Hallbjørg Hansen sigur, at tað í býráðnum leingi hevur verið tosað um at fáa dagført skúlan soleiðis, at hann nøktar øll tey krøv, nýggja lógin setur. Men tað varð hidið vera óráðiligt at fara undir allar umbyggingarnar í senn, og tí valdið býráðið at gera eina heildarætlan fyri skúlan, sum verður framd í smáum.



*Ætlanin er at nýta tilsamans 50,5 milliónir krónur til at byggja skúlan í Fuglafirði um fyri*

**Skal verða sum nýggjur**

Skúlin í Fuglafirði er ein gamal skúli, og partar av honum eru í heldur ringum standi. Elsti parturin av skúlanum varð tikin í nýtslu í 1936. Hesin skúlabygningurin stóð síðani óbroyttur til fyrst í sekstiárunum, tá ein stórur bygningur varð bygdur upp í gamla skúlan.

Tað mesta av nýggjara partinum av skúlanum varð tikið í nýtslu í 1964. Í 1973 varð eisini ovasta hæddin í skúlanum tikin í nýtslu saman við svimjihylinum, og síðani tá er einki stórvegis gjørt við nýggjara partin av skúlanum. Tó varð eitt sindur gjørt við elda partin í áttatiárinum, fyri at hesin skuldi lúka ásettu brunakrøvini.

Men nú skal Fuglafjarðar skúli umvælast, samstundis sum bygt verður afturat. Hallbjørg Hansen greiðir frá, at kommunan í fyrstu atløgu fer at skifta vindeyguni og takið á gamla bygninginum. Síðani skulu veggirnir inni í skúlanum klæðast og málast.

Ætlanin er, at skúlin í Fuglafirði at enda skal vera ein nýggjur skúli allur sum hann er.

# Uppritið latið fjølmiðlunum

## *Uppritið til ríkisrættarligu samráðingarnar er nú latið fjølmiðlunum – men tað er latið í trúnaði*

John Johannessen

Beint fyri middag í gjár komu boð úr Tinganesi til føroysku fjølmiðlarnar um, at teir stutt eftir middag kundu koma og heinta nógv umtalaða uppritið til ríkisrættarligu samráðingarnar við donsku stjórnina.

Men samstundis varð greidliga gjørt kunnugt, at uppritið varð latið í trúnaði, og at fjølmiðlarnir tískil ikki kunnu endurgeva úr tí fyrr enn uttanlandsnevndin er liðug at viðgera tað.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanlandsmálum, sigur orsøkina til, at fjølmiðlarnir nú hava fingið uppritið vera, at landsstýrið metir tað vera rætt, at miðlarnir sleppa at kunna seg við innihaldið í tí, áðrenn tað verður almannakunngjørt og tískil kemur út til alment kjak.

Høgni Hoydal heldur tað vera týdningarmikið, at myndugleikarnir og fjølmiðlarnir hava álit á hvørjum øðrum. Tí heldur hann tað vera púra rætt at lata miðlunum álitið.

– Vit hava ásannað, at fjølmiðlarnir fingu Hvítubók ov seint, og av tí sama fingu teir ikki stundir at fyrireika seg væl til viðgerina av henni, árenn hon varð almannakunngjørd, sigur Høgni Hoydal, ið kortini ikki vil siga, um hann var nøgdur við viðgerð fjølmiðlanna av Hvítubók.

Eisini heldur ásannar Høgni Hoydal, at hernaðarfrágreiðingin varð latin fjølmiðlunum í so seint.

Uttanlandsnevndin hevur fund aftur fríggjadagin. Verður hon tá — eins og væntað — liðug at skriva álit, verður uppritið tá almannakunngjørt.




*Á uppritinum, ið er latið uttanlandsnevndini stendur trúnaðarstempul á hvørjari síðu. Á uppritinum, ið er latið fjølmiðlunum er bert trúnaðarstempul á forsíðuni*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

# Kunnaði blaðmenn um Føroyar

Samfelagsfrøðingurin Sjúrður Skaale hevur júst verið í Danmark og kunnað norðurlendskar journalistar um Føroyar og føroysk viðurskifti.

Journalistarnir vóru á skeiði á Nordisk Journalistcenter í Århus, og partur av sjey viku langa skeiðnum var kunning um øll viðurskifti í teimum ymsu norðurlondunum.

Ein dagur var settur av til at fáa kunning um Føroyar, og tað var Sjúrður Skaale sum fekk uppgávuna at gera journalistarnar klókari upp á føroyska samfelagið.

Sjúrður Skaale greiddi frá um politisku skipanina, hvussu hon er upppbygd og virkar, og hann segði eisini frá aktuella støðuni í føroyskum politikki.

**ek**

